# Bíleggið oljupakkan nú!

Tað fer ikki dagur, at ikki onkur lesari setir seg í samband við blaðið og biður um at fáa alt tilfar, sum hevur verið í blaðnum um okkurt ávíst evni.

## Vit vilja menna orðaskiftið

Vit fara nú sum eina roynd at taka ynskið frá lesarum okkara – og tað eru fólk um alt landið – til eftirtektar og bjóða tykkum at keypa fyri bíligan penga alt savnað tilfar um ávís evni.

Við hesum vilja vit fegin gera okkara til at menna orðaskiftið, sum er eitt tað mest týðandi grundarlagið undir demokratinum.

Nettup tann sannroynd, at blaðið hevur roynt at lýsa mong ymisk samfelagsmál frá fleiri síðum og harvið hevur hýst nógvum ymiskum meiningum, ger tað møguligt at fara undir slíkt tiltak.

Hetta er so eisini ein tíð, har so mangt bylgist í fólki, og tað er m.a. fyri at fáa eitt breitt og sakligt orðaskifti, at vit nú koma við hesum tilboði.

Vit halda tað er einki meira enn natúrligt, at eitt blað, sum dag um dag, viku eftir viku, mánað eftir mánað og ár eftir ár viðger flestallar samfelagsspurningar, verður brúkt til slíkt endamál.

## Skúlar, stovnar, feløg, politikarar o.o.

Tað eru serliga fólk undir útbúgving av alskyns slag, sum ringja til okkara og biðja um at fáa alt tað, sum er skrivað um eitt ávíst mál. Tað eru eisini skúlaflokkar, sum vilja hava tilfar, tað eru feløg, stovnar og nógvir einstaklingar.

## Undirgrund og marknaðarsamráðingar

Sum eina byrjan hava vit tí nú gjørt eina roynd at savna tað nógva av tilfarinum, sum hevur verið í blaðnum seinastu 10 árini um undirgrund, olju og marknaðarsamráðingar. Hetta tilfarið er sera rúgvusmikið og fevnir um fleiri hundrað A4-síður.

Tilfarið varð savnað í sambandi við, at tingið herfyri fyri fyrstu ferð viðgjørdi spurningin um eina komandi oljuvinnu her á landi. Tað vóru politikarar og teirra millum øll javnaðarmanningin á tingi og í landsstýri, sum ynsktu at fáa alt hetta tilfarið til tess at kunna kunna seg um málið undan orðaskiftinum á tingi.

Nú bjóða vit so øllum okkara lesarum sama tilfarið, ið er avrit av greinum o.o. um oljuvinnu og samráðingar við tilknýti til hana. Hetta tilfarið er alt savnað í einum ringbindi og tískil sera høgligt at koma framat.

## Bert 500 krónur

Takið av tilboði okkara fyri bert 500 krónur.

## Eisini onnur evni

Um áhugi er fyri at fáa alt tilfar um onnur evni eisini, so eru vit til reiðar. Men tað veldst sjálvandi um, hvussu stórur áhugin er.

Evnini kunnu vera so mong, alt frá sanering av fiskiídnaðinum til spurningin um okkara sjúkrahúsverk, fyri bert at nevna tvey dømi.

Um ikki so langa tíð verða tvær ráðstevnur í Havn um ávíkavist eina komandi oljuvinnu og so seinastu sjúkrahúsfrágreiðingina. Nú er tað so, at Tíðindablaðið Sosialurin hevur dekkað hesi bæði eki rættiliga gjølla seinastu 10 árini.

## Oljupakkin

Í »Oljupakkanum« eru m.a. allar tær áhugaverdu greinarnar hjá Sverra Dan Joensen, sum úr Bahrain hevur gjørt viðmerkingar í Sosialinum til teir flestu av spurningunum, sum snúgva seg um eina komandi oljuvinnu, mangar áhugaverdar samrøður við ein av oddamonnunum í oljuráðleggingarbólkinum og ein av stjórunum á Danmarks Geologisk Institut, Stefan Hullberg, ið er ein tann mest serkøni í øllum oljuspurningum – eitt nú prát við ein av stigtakarunum til felagið Føroya Oljuídnaður, Johan Mortensen, sum heldur at vit eiga at fara undir oljuvinnu sum skjótast, umframt samrøður við ymsar útlendskar serfrøðingar á økinum.








Halda tit, at hetta ljóðar áhugavert og meta tit, at tit hava brúk fyri at síggja alt tilfar um umrøddu evni, so er at fylla seðilin út ella ringja til okkara á tlf. 11820



**Ja!** Send mær savnað tilfar um:

Evni: ..................................................

..................................................

..................................................

fyri kr. 500,-, sum eg gjaldi

❑ Viðl. kekki, ❑ Postuppkravi ella ❑ Banka/giroflyting

Navn: ..................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: .............................. Tlf.: ..................

Sendið lepan til
**Tíðindablaðið SOSIALURIN**
**Box 76 – 110 Tórshavn**

Í oljupakkanum eru eisini fleiri samrøður við Maritu Petersen, løgmann, sum umsitur hetta stóra málsøkið: Undirgrund

# Mennandi kjak krevur KUNNLEIKA